

# Heilsu- og Umsorganartænastan í Tórshavnar kommunu bjóðar venjing og undirvísing til fólk við Parkinson

Hevur tú Parkinson, ert 67 ár ella eldri og hevur áhuga í at venja saman við øðrum í somu støðu, er hetta tilboðið til tín. Vit bjóða skeið fyri tær, sum nýligani hevur fingið staðfest Parkinson (skeið A) og fyri tær, sum hevur livað við Parkinson í eina tíð (skeið B).

Talan er um tvey ymisk skeið, ið fevna um venjing og undirvísing frá ergoterapeutum og fysioterapeutum.
**Skeið A** fevnir um 16 vikur, har vit møtast einaferð um vikuna í uml. 1-2 tímar.
**Skeið B** fevnir um 12 vikur, har vit møtast tvær ferðir um vikuna í uml. 1-2 tímar.
Pláss er fyri 8 luttakarum á hvørjum skeiði.

Á skeiðunum fara vit, saman við tær, at leggja dent á ein góðan og virknan gerandisdag, har vit savna okkum um:

- At venja kondisjón, styrki, áhaldni, kropsburð og javnvág
- At fyribyrgja hjáárin av sjúkuni
- At læra um sjúkuna
- At stuðla uppundir egna ábyrgd
- At fáa ein meiri virknan gerandisdag

Hevur hetta tín áhuga, kanst tú tekna teg á torshavn.fo- far undir sjálvgreiðsluna og fyll út “Ávísing til ergo- og fysioterapi”. Fyll skjalið út, har tú viðmerkir Parkinson undir “Orsøk”.

Eru ivamál, ella vilt tú hava nærri kunning, ert tú vælkomin at seta teg í samband við:

Elsu Mariu Mikkelsen
Deildarleiðari fyri ergoterapeuttoymið
elsamaria@torshavn.fo
Tlf.: 79 31 06

Jákup Petur Eliassen
Deildarleiðari fyri fysioterapeuttoymið
jakupp@torshavn.fo
Tlf.: 79 31 45